skemt

# Byggilist









Í vetur hevur arkitekturin Albert Isfeldt sagt sína hugsan um bygging og býarplanlegging í Føroyum. Hann hevur ferðast kring landið saman við útvarpsmanninum Gunnari Nolsøe, og teir hava fingið mangt prátið um føroyska byggilist – ella mangul av tí sama. Spurningurin er so, hvat Albert og Gunnar høvdu fingið burtur úr hesari byggingini, sum tó ikki er gjørd í Føroyum – enn.

# Í rangastrúpan

***Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.***

**Meiriluti ella minniluti**
Greiður meiriluti fyri niðaru loysnini. Í prosentum var talan um 59 prosent fyri ovaru loysnini og 40 fyri teirri niðaru.
Olivant

**Dollarin í botni**
Hóast Bill Gates gevst, kemur hann neyvan at mangla smør á breyðið. Hann og konan hava ein felags grunn, "Bill & Melinda Gates Foundation" eitur hann, og í honum sigast at vera 37,5 milliardir dollarar. Við dagsins kursum svarar tað til 176 milliónir krónur.
Dimma

**Fiti skal valdast**
G-Mini er feitur tónleikur í feitum umstøðum til feit fólk.
Jón Tyril á Rás2

**Hvar er javnstøðan?**
Sjey kvinnur gera ólavsøkukabarett
Dimma

**Ganga á vatninum**
Sunnudagin 6.juli skipar Norðoya Gongufelag fyri spennandi gongutúri til tí søguríku oynna Svínoy.
Norðlýsið

**Løgnir trupulleikar**
Flogfarið hjá Barrack Obama fekk tekningar trupulleikar og noyddist at seta seg.
Olivant

**KÍ flutt til Gøtu**
Uttan sigur í tríggjar dystir skuldu vit í dag royna at reisa okkum, tá ið vit vitjaðu KÍ í Sarpugerði.
B36-heimasíðan

**Til gongu ella uppi á súkklui?**
Datt á súkklu
Dimma



# Nú stendur nógv uppá spæl

Møguliga hava hesir menninir ikki nakað frægari at takast við, ella kanska hevur stakkalin í miðjuni bara tapt eitt veddumál. Í øllum førum má sigast, at talan er um ein djarvan mann, sum letur nógv standa upp á spæl, tá hesturin skal royna at loypa upp um hann.

# Ansa eftir Condoleezza



Amerikanski uttanríkisráðharrin Condoleezza Rice vitjaði um dagarnar í kekkia, har hon var móttikin av kekkiska uttanríkisráðharranum Karel Schwarzenberg. Tey tosaðu millum annað um nýggjan rakettskjøldur, men vit hava bert eitt at siga við Condeleezzu: Ansa eftir hasum Schwarsenberg!

# Grava eftir gulli



Hendan myndin er tikin frá G8 fundi, sum er eitt samtak millum nøk ur av heimsins mætastu londum. Bush, Merkel og hini í harkaliðnum eiga nógvar pengar, men spurningurin er, um tey her stytta sær um stundir við at grava eftir gulli.